# Móttakari frá Televarpinum orsøkin til eld

» Tá ið svarið kemur verður støða tikin til, hvat skal henda



**ELDSBRUNAR** Tvær ferðir hetta seinast árið hevur ein móttakari frá Televarpinum verið orsøkin til, at eldur er komin í sethús

Áki Bertholdsen

Nú eru umfatandi kanningar settar í verk fyri at vita um móttakarar til sjónvarpssendingar frá Televarpinum hava eitt brek, sum ger, at eldur kemur í.

Hesar kanningar eru settar í verk eftir at tað tvær ferðir hetta seinasta árið er staðfest, at móttakarar frá Televarpinum hava verið orsøkin til, at eldur er komin í sethús.

Tað sigur Michael Gram, politistur, sum hevur kannað hesar báðar eldsbrunarnar.

### Tvær ferðir í eitt ár

Fyrri eldsbrunin var á Stykkinum hósdagin 3. september í fjør, tá ið eini hús vórðu rættiliga herjað av eldi og tað hendi aftur í Kvívík sunnudagin 18. juli í ár, men ta ferðina fingu húsini ikki so stóran skaða.

Í báðum førum er tað staðfest, at eldurin kyknaði í einum móttakara frá Televarpinum.

Báðir móttakararnir eru av merkinum "Force, men talan var um hvør sítt model.

Báðir móttakararnir vórðu sendir til serfrøðingar í Danmark til tekniskar kanningar og í báðum førum varð staðfest, at tað var í teimum, at eldurin var kyknaður.

Báðir stóðu í bíðistøðu, tá ið eldurin kyknaði.

Úrslitið frá Dansk Brand og sikringsteknisk Institutt, DBI, vísir pura greitt, at tað er skammlop í móttakarunum, sum er orsøkin.

Michael Gram sigur, at nú er eftir at staðfesta, hvat hevur elvt til skammlop í móttakarunum.

- Tað kann vera ein feilur í sjálvum móttakaranum. Orsøkin kann eisini vera, at toran er sligin niður, men orsøkin kann eisini vera, at streymviðurskiftini frá SEV ikki eru, sum tey skulu, eitt nú at spenningurin er óregluligur.

- Men tað reisir so aftur spurningin, hvussu tað ber til, at talan í báðum førum er um móttakarar av sama merki, sum eru orsøkin til skammlop.

Politisturin tekur málið í so stóran álvara, at hann hevur verið í samband við bæði Televarpið og Brunaumsjón Landsins um málið.

- Er talan um feil í móttakaranum er tað øll grund til at vera á varhaldi, leggur hann afturat.

Hann fegnast bara um, at báðir eldsbrunarnir vóru mitt um dagin.

- Tað kundi akkurát tað sama verið hent um náttina og so hevði fólk ligið og sovið í húsunum og avleiðingin av tí, tori eg ikki at hugsa um, sigur Michael Gram.

aki@sosialurin.fo

## Kanna málið til botns

Brunaumsjón Landsins tekur tað í størsta álvara, at móttakarar frá Televarpinum tvær ferðir hetta síðsta árið hava verið orsøkin til eldsbrunar.

Petur á Lava Olsen, deildarstjóri, sigur, at hann hevur fingið frágreiðingina frá Løgregluni og nú hevur hann sett sínar egnu kanningar í verk.

- Eg havi nú vent mær til Sikkerhedsstyrelsen í Danmark, sum góðkennir el-lutir, fyri at vita, hvørjar royndir tey hava av hesum móttakarunum í Danmark.

- Tey eru nú farin at kanna sítt tilfar fyri at vita um tey kenna nakað til, at trupulleikar hava verið við hesum móttakarunum.

Tá ið svarið kemur haðani, verður støða tikin til, hvat so skal henda.

Men tað er ringt at siga, nær svarið kemur.

### Undarligt samanfall

Petur á Lava Olsen sigur, at ein ivaspurningur kann vera, at í Danmark eru tað ikki so nógv, sum hava móttakarar longur til sjónvarp, tí tey flestu eru í antennufeløgum og hava kaðalsjónvarp.

Hann viðgongur kortini, at tað er undarligt, at sama slagið av móttakarum er orsøkin til tveir eldsbrunar, so hann tekur málið í tí álvara, tað skal.

Hann fer eisini at kanna eftir um ein útvegur er at leggja málið fyri Elnevndina at vita, um hetta er innanfyri teirra heimildarøki.

Hann leggur eisini afturat, at beint nú dugir hann heldur ikki at siga, hvussu farið verður fram, skuldi tað víst seg, at umrøddu móttakarar veruliga hava eitt brek, sum ger, at eldur kann koma í teir undir ávísum umstøðum og um tað er nóg mikið til at krevja, at Televarpið innkallar allar móttakarar aftur, ella ikki.